| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 20. desember 2018 |
| Býráðsfundur nr. | 13/2018 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2018 tann 20. desember kl. 19.00 varð eykabýráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 14. desember 2018 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**

Sonni á Horni
Eivin Breiðaskarð
Kristian Petersen
Ólavur Larsen
Árant Berjastein
Magni Herason Jøkladal
Sigurð S. Simonsen
Eyðun á Lakjuni
Edva Jacobsen

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, kommunustjóri

**Mál nr. 51/2018.**

**Tilmæli um góðkenning av sáttmálum til stórarbeiðstøku til Fuglafjarðar skúla**

Mentamálanevndin hevur á fundi 17. desember 2018, viðgjørt sáttmálar 4, 5 og 6 um stórarbeiðstøku til Fuglafjarðar skúla

Talan er um sáttmála 4 við MT Højgaard áljóðandi 36.409.828,- mió, uppruna tilboð 35,8 mió og umfatar sáttmálin timbur, snikkara,múrara, gólv og máliarbeiði.
Sáttmáli 5 við P/F Victor Á Lakjuni áljóðandi 12.419.163,- mió, uppruna tilboð 12,7 umfatar HVS og ventilatión.

Sáttmáli 6 við Elcon kr. 6.092.236,- mió, uppruna tilboð 6,1 mió, um elarbeiði.
Samanlagt eru hándverkaraútreiðslurnar fyri sáttmálar 4, 5 og 6 á 55.071.227,- mió.
Hándverkaraútreiðslurnar HTÚ og tilkeyp 79.105.871 mió

Tað er ein samd mentamálanevnd, sum tekur undir við sáttmálunum og mælir mentamálanevndin til at býráðið undirskrivar sáttmálarnar við MT Højgaard, Victor á Lakjuni og Elcon.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá mentamálanevndini um góðkenning og undirskriving av sáttmálunum í sambandi við stórarbeiðstøku til Fuglafjarðar skúla. (8-0).

Eyðun á Lakjuni luttók ikki á fundinum vegna ógjegni, hvørki undir viðgerð, ella tá ið avgerð varð tikin.

Kl. 15.30 møttu Rúni Abrahamsen og Heidi Poulsen frá MAP arkitektum fyri at greiða býráðnum nærri frá arbeiðinum til sáttmálararnar, sum býráðið kom at viðgera og taka avgerð um á fundinum kl. 16.00.

Eftir at avgerðin varð tikin vórðu sáttmálarnir millum kommununa og MT Højgaard, P/F Victor á Lakjuni og Elcon undirskrivaðir í 2 eintøkur, einum til hvønn partin.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 16.30.

Eivin Breiðaskarð

Kristian Petersen

Árant Berjastein

Magni Herason Jøkladal

Ólavur Larsen

Eyðun á Lakjuni

Sigurð S. Simonsen

Edva Jacobsen

Sonni á Horni

Skrivari:

Jákup Frants Larsen